## DAGSINS MEINING

# Einfaldir spurningar

Mest einfalda slagið av kommunikatión, er tað slagið man m.a. kann brúka í marknaðarføring. Man ger heimin svart hvítan – rætt og rangt. Tey, ið brúka undursápuna og so øll hini, ið fylgjandi lukta, eru ómodernað, ella hvat man nú roynir at billa fólki inn við handilslýsingum. Kóka heimin niður til nakrar einfaldar spurningar, ið ikki kunnu svarast einfalt, uttan við undurmedisininum, ið man nú einaferð roynir at kroysta niður um oyruni á fólki, so selir man vøruna. Í førinum hjá varaløgmanni er tað undurloysnin, ið klárar alt líka frá krígskunning til bispasetanir, nevniliga fullveldi.

Tíbetur er politiski keyparin ikki so lættur at lumpa, og er hetta staðfest í seinastu veljarakanningunum. Ikki eigur at bera til hjá varaløgmanni, eftir at hava brúkt trý ár til at problematisera onkra umseting, skrivað ST brøv og móttikið prístalsreguleraðan blokk, at kóka alt niður í níggju lættisoppaspurningar. Eitt lættkeypt svar til teir níggju lættkeyptu spurningarnar, við undantak av ósakligu pástandunum um undirgrund og umsetingina av »tjóð«, vildi verið: »tí vit føroyingar av praktiskum og søguligum orsøkum ynskja tað í løtuni, men sjálvsagt kunnu broyta meining nær tað skal vera«.

Nú er tað sjálvsagt eitt nógv størri og betur funderað orðaskifti, vit hava tørv á, men lat okkum eina løtu føra politiskan polimik eins og varaløgmaður.

Hví blíva fullveldismenn við at undirminerað vunnin rættindi, við støðugt at føra fram, at danir hava nakað at siga viðvíkjandi undirgrundini?

Hví seta fullveldismenn ikki ryssuna fyri vognin heldur enn øvugt, og loysa áðrenn man vil rópa seg natión í ST høpi?

Hví bjóða tjóðveldismenn seg fram at sita í Føroya Løgtingi og landsstýri, um teir meina at danskir myndugleikar ráða í Føroyum?

Hví vil man móttaka pengar frá danska statinum og ikki minst, hví hevur man viljað tað tey seinastu nógvu árini, tá hesir pengar nú einaferð bert eru til skaða og fortreð?

Allir oman fyri standandi spurningar kunnu kókast niður til, hví tjóðveldismenn ikki bara loysa, heldur enn at royna at uppfinna grundir til at danir skulu nokta okkum tað. Danir fara ongantíð at forða fyri einari føroyskari loysing. At man ikki fær 15 milliardir við sær, tá man fer, kann neyvan kallast ein fótongul av teimum heilt stóru. Vilja menn loysa, og seta Havnina á verðinskortið við sama status sum Funafuti, ið er høvuðsstaðurin á Tuvalu, ið fullveldislandsstýrið slerdi stórt upp á skattafíggjaðari heimasíðu um land nummar 189 í ST, so er bara at gera tað. Tjóðveldismenn mugu gevast við at yvirbevísa seg sjálvan og sínar veljarar um, at tað er nakar annar enn føroyingar sjálvir, sum avgera, um vit skulu loysa ella ikki.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Barnagarðar í politiskari klemmu

**Jógvan Arge**
*býráðslimur*



Havi lagt til merkis, at alt verður ikki sagt í málinum um teir báðar barnagarðarnar, sum Tórshavnar Kommuna ætlar at leiga frá byggimeistarum. Málið um tey seks innkomnu tilboðini hevur verið til støðutakan í mentamálanevndini tann 19. september, og á tí fundinum gjørdi nevndin eina samtykt, sum síðani skuldi leggjast fyri býráðið.

Meirilutin í nevndini, sum eru samgongulimirnir Heðin Mortensen, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen, samtykti eftir tilmæli frá einum bólki av embætisfólkum hjá kommununi, sum hevði mett um tilboðini, at taka av einum tilboð frá Sp/f Høgna Mikkelsen, tí at hetta tilboð skuldi vera eitt vet bíligari enn eitt tilboð, sum Sp/f Búsetur hevur latið inn.

Minnilutin í nevndini, eg sjálvur og Elin Lindenskov, tók ikki undir við hesum tilmæli. Vit skutu upp at taka við tilboðnum frá Sp/f Búsetur, tí at arkitekturin og innrættingin var betri í hesum tilboðnum. Vit mettu, at tann evarska lítli kostnaðarmunurin, sum metingarbólkinum hevði roknað seg fram til yvir 15 ár, ríkiliga verður uppvigaður av teimum trivnaðarligu fyrimunum, sum eru í tilboðnum frá Sp/f Búsetri.

Meirilutin tók ikki undir við okkara sjónarmiðum, men samtykti at koyra tilboðið frá Sp/f Høgna Mikkelsen ígjøgnum. Ikki fyrrenn eftir fundin í mentamálanevndini er tilfarið um barnagarðarnar sent til grannskoðarar og advokatar at viðgera. Vit í minnilutanum vita ikki reiðiliga, hvat endamálið er við hesi eyka viðgerð, men vit hava loyvi at gera okkum okkara tankar.

# Borgarar & rættindi & skyldur?

**Hans Birgir Hansen**

Tað eigur av politiskum/lands/kommunalum/ríkismyndugleikum/valdum at vera kravt at allir borgarar skulu kunna seg lóg og landaskil og rættindir og skyldir! Tað eigur at vera ein partur av dagliga lívinum hjá øllum at fáa sær neyðugu kunning gjøgnum dagstovnar/skúlar/lærustovnar/bløð/loftmiðlar/bókasøvn v.fl.! Tað eigur at vera kravt av teimum, ið taka sær av børnum/ungdómum/tilkomnum hjá áðurnevndu at fáa teimum neyðugu kunning so vit skapa fyribyrgjan! Tað eigur at vera tikið upp aftur táttin fyribyrgjandi tiltøk við frálæru tilfari fyribyrgja kriminalitet/harðskap/rúsdrekka/narkotika fleiri hava liggjandi! Tað eigur at vera kravt at foreldur vera drigin til svars tá børn/ungdómar/teirra fremja beistalevnað/harðskap/kriminalitet ein upplivir í Havnini! Tað skal tí alment vera heitt á foreldur at fáa kunna børn/ungdómar/tilkomin tá hesi eru heima við hús og úti í tí dagliga arbeiði/starvi/hjá áður nevndu!

Tað er ikki minst galdandi úti í frítíðarfelagsskapum/fakfeløgum/ølklubbum um alt landið og í Havnini. Hví ikki fáa samskipa fyribyrgjan! Tað skal av borgarum vera kravt at landspolitikarar fáa endurskoða/dagført lógir/skipanir/mannagongdir/kunngerðir/reglugerðir! Tað er uppá tíðina at fáa fyribyrgjandi virksemi samskipa frá dagstovum til hægri lærustovnar og úti í felagsskapum/ølklubbum! Tað skal gerast partur av tí dagliga samskifti/samstarvi millum allar borgarar, ið skulu kenna avleiðingar av lógar- og rættarbrotum!

Tað skal komast aftur til rúsdrekkalógina v.m.!

# Tarvamykjukapping

TÍÐINDASKRIV

Stór tarvamykjukapping verður í Klaksvík leygardagin kl. 14.00. Í hesum sambandi verða teigar seldir, og teigarnir verða seldir á Shellstøðunum í Norðragøtu og við Ringvegin í Havn til fríggjadagin kl. 19.00, og á Shellstøðini í Klaksvík kunnu teigar keypast til kl. 13.00 leygardagin. Eisini ber til at bíleggja teigar á telefon 225200 og vit senda um alt landið.

Kappingin verður hildin á økinum millum Posthúsið og Telefonhúsið. Eisini verða nakrir eykavinningar sum t.d. Coca Cola, sodavatn, olja og fartelefon. Tann, sum vinnur tarvin, er tann, sum fær mest mykju á sín teig, so tað ræður um at gera skjótt av við at keypa sær teig, um tit skulu verða við í kappingini um henda stóra tarv, sum er úr Kaldbak. Tarvurin vigar uml. 600 pund, og vinnarin fær tarvin koyrdan døgurðakláran til dyrnar.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Hvat er satt, tá ið tíðindi verða borin frá vígvøllunum?



**Frits Johannesen**

*Kelda: Ryggsekkjournalister og digitale informasjonskrigere av Rov Krøvel*

Ofta verður havt á munni, at fjølmiðlar og loftmiðlar vunnu Vietnamkríggið. Kríggj hevur sjáldan loyst trupulleika hjá tí vanliga fólkinum, men bert lagt stein oman á byrðu, pínt, tínt og lagt ein ófrættadám yvir tilveruna, so ilt hevur verið at sæð nakran glotta fyri framman. Fjølmiðlafólk vera eisini tíðum fyri ágangi frá valdsharrunum og ikki so fá bøta við lívi sínum, meðan tey royna at flyta tíðindi frá økjum, har ófriður valdar.

**Arkin**
Á Arkini í Keypmannahavn síðsta heyst var ein myndlista-framsýning, ið bar heitið: Menniskjað í hálvt árhundrað sæð gjøgnum menniskjalikamið. Hetta var eitt kó frá síðsta árhundrað. Frá fimmti árunum til ár tvey túsund. Ikki sørt av dapurleika var at síggja á hesi framsýning, hvar deymurin av ræðuleikum fór sum ein reyður tráður gjøgnum myndirnar. Tað verður bara ov drúgt í hesi viðgerð, at koma inn á søguna frá hesi framsýning, men sigast kann, ikki eru vit farin so væl við okkum sjálvum, at vit kunnu breggja okkum av, at vit eru tey fullkomnu. Nei, Fyrriheimsbardagið, Seinniheimsbardagið, Koreakríggið, Kinesiska kollveltingin, Russiska kolveltingin, kríggj í Afrika, kríggj í Suðuramerika, Millumamerika, Miðeystri, Flógva kríggið, Deseret Storm o. s. fr. hava gjørt, at tú næstan kendi deymin av svidnaroyki av mannakjøti úr myndunum. Har var eisini ein standmynd við áseymaðum, rotnandi oksakjøti í flísum, sum leiddi tankarnar víða um. Tú stóð har og hevði ringa samvitsku. Tað líðandi menniskja bar krossin, og tað tóktist, sum Guð var deyður, og í hesum ragnarroki livdi lygnin_.. og hon ger tað enn.

**Desert Storm**
Hvar liggur sannleikin, tá ið kríggj er landanna millum? Eg kom at hugsa um t. d. Desert Storm, tá ið nýggja heimsskipanin var klakt av Geoge Bush tí Eldra og Norman Schwarzkopf - generalurin við "superintellegensinum", sum reikaði sum ein leyva í oyðimørkini og savnaði fjøld av herfólki, at leypa á Saddam Hussein, sum jú hevði tikið Kuwait og oljuríkidømið í hesum landi. Tíðindi vórðu borin dag sum nátt í úttvørpum, sjónvørpum og bløðum frá hesum samansjóaða hermóti. Í mongum føri tyktist hetta sum undirhald. Kríggj var blivið til undirhald, og orðaríkið Norman Schwarz kopf var tann stóri cowboyarin í hesi søk. Skrál og skról hoyrdist víða um, og løgið tykist tað mongum enn tann dag í dag, at teir(amerikanar og bretar) kríggjast enn ímóti Saddam Hussein. Maðurin situr eins tryggur í sínum sæti enn tann dag í dag. Fatið tað, hvør, ið fata vil.

**Kuwait**
Stjórnin í Kuwait bar ikki orð á fyri at vera eitt frílynt fólkastýri, t. d. hevði Amnesty International sett fingur á hetta stýrið fleiri ferðir fyri tess ágang ímóti sínum undirsáttum.. Tann kuwaitiski yvirklassin livdi í marglæti t. d. keypti hópin av stórum bilum og marglætislutum, sum bert var ein dreymur hjá tí vanliga borgarinum. Stórur partur av arbeiðsmegini í landinum vóru fremmandaarbeiðarar, sum onga vón høvdu um borgararætt ella atkvøðurætt í hesum landi, og eru nógvar svárar søgur, um hvussu hetta fólk verður viðfarið av hesum marglætisstýri.

Hvussu skuldu so bretar, amerikumenn o. a. fáa fólk at skilja, at tað var neyðugt at senda ungar soldatar út í oyðimørkina, at verja eitt marglætisstýri, sum ikki hevði ferilin av demokratiskum anda í sær?

Vietnamkríggið var enn ein tortur í eygunum á amerikumonnum, so svárt var tað, at fáa spæli í gongd: at verja demokratiska rættin hjá tí nýggju heimsskipanini.

**265 000 irakiskir hermenn**
Mangir eru leikirnir í búnum talvi. Knappliga hoyrdust tíðindini, at Saddam Hussein hevði savnað saman 265.000 hermenn fram við tí saudiarabiska markinum. Hetta var ein stór hóttan ímóti Saudi -Arabiu (stýrið í hesum landi er eins ófrætta kent sum í Kuwait), men fekk Saddam Hussein tikið kvørkratak um hálvoynna, hevði hann so stórt vald, at hann kundi stýra floyminum av oljuni til Vesturheimin. Tað fyrsta herfólkið frá Vesturheiminum varð tí sent til tað Saudi-Arabisku oyðimørkina, at verja markið ímóti herfólkinum hjá Saddam Hussein. Hesin pástandur var ein høvuðsbrikkur í hesum talvleiki.

**Fyligisveinamyndir**
Sjónvarpsstøðin ABC hevði skaffað sær fleiri myndir frá russum — Sojus-Karta - frá økinum, har herfólkið hjá Saddam Hussein stóð. Væntandi var at síggja ein ein hóp av herfólki fram við markinum millum Kuwait og Saudi-Arabiu, men var ikki ein hermaður at síggja og ei heldur eitt einasta tanks ella goturstykki. Vóru hesi herfólk og goturstykki farin upp í royk, ella vóru tíðindini frá amerikansku stjórnini ikki álítandi?

(Peter Blumberg: " Satelite Picture Puzzle" — Washington Journalist Reviewe mai 1991.)

ABC brúkti ikki hesar myndir, tí hildið varð, at møguliga vóru myndirna ikki tiknar tann dagin, sum sagt var at tær vóru; men okkurt var í hesum, sum ikki kundi mótprógvast.

**Álopið á Kuwait**
Tað var einki nýtt í tí, at Irak vildi hava Kuwait. Hetta var væl kent í tí arabiska heiminum, og vóru fleiri stjórnir, sum hildu, at hetta var ikki av leið, at so var. Møguliga hevur Saddam Hussein hildið, at hann slapp snikkaleysur burtur úr sínum álopið á Kuwait , tí í krígnum móti Iran, varð ikki klovið í tvey um hesa herferð hansara, somuleiðis, tá ið hann gassaði kurdisku bygdini Halabaja. Hann stuðlaði eisini virknum yvirgangskroppum, sum Bush eldri væl visti um (The Economist 9. August 1997), og kleiv ikki í tvey um hesar dára gerðir Saddam Husseins. Í politikki er mangt forborgið, sum vit lítið skilja av .Saddam Hussein var ein góður partanari hjá USA á tí politiska og hernarliga leikpallinum — og hvat kunnu vit siga um henda leik í dag, nú Saddam Hussein situr og smírist í sinum tignarstóli? Ja, tað nyttar lítið hvat gjógvaramenn siga, varð sagt undir krígnum á Muntra í Fuglafirði, tá ið menn umrøddu krígsgongdina á vígvøllinum undir Seinna heimsbardaga.

Sjálvandi visti Saddam Hussein, at leyp hann á Saudi-Arabia var hann illa sæddur, hetta vildi verið ein krígsavbjóðing móti vesturlendsku ídnaðarsamfeløgunum, sum dag og dagliga javnt og samt skuldu hava floymin av olju at reka samfelagið við. Men hvat við myndunum frá russum?

**Jean Heller og fylgisveinamyndir frá russum**
Jean Heller journalistur á St. Petersburg Times sá, at nakrar myndir vantaðu hjá ABC av sunnara helmingi av Kuwait. Kanska goymdu 265.000 hermenn seg har? St. Petersburg Times keypti tær írestaðu myndirnar frá Sojus- Karta, og læt serfrøðingar granska myndirnar. Hetta vóru somu serfrøðingar, sum høvdu hugt at myndunum, sum ABC hevði ognað sær, men ikki sóu teir nakrar hermenn av irakiskum uppruna við markið. Møguliga var tað lognbrá og sólarseilir í oyðimørkini, sum sárkaðu myndirnar, so einki sást. Sami fylgissveinur vísti myndir av tí vesturlendsku dubbingini í oyðimarkarsandinum við hópin av amerikanskum herfólki. Hvussi kundi hetta skiljast? Tað var ikki lætt.

St. Petersburg Times vildi hava prógv frá tí amerikansku stjórnini um teir irakisku hermenninar. Hetta vildi stjórnin ikki. Hóast tað, førdi Jean Heller seg ikki fram sum ein margskálk í hesi viðgerð. Hon fór hóvliga til verka. Hon vildi ikki leggja amerikansku stjórnina undir lygn, tilvitarliga frásagnir og viðgerð av upplýsingum, sum bert tænti teimum.

**Peter Williams**
Peter Williams, talsmaður í Hvítu húsunum hevði fingið henda spurning settan av teimum stóru tíðindatænastunum, um nakað prógv var fyri at irakiskir hermenn flyktust við markið til Saudi-Arabiu. Hann hevði spurt Pentagon um hesi viðurskifti. "Jú," segði hann, " honum varð víst myndir av píkatráði, skotgrøvum, tanksum og øðrum krígsamboðum, sum bar boð um, at Saddam Hussein var í fer við at byggja upp eitt álop á Saudi-Arabia." Hetta slúktu tíðindatænasturnar rátt sum t. d. ABC, CBS og aðrar, sum høvdu fingið varhugan av, at ikki alt ruggaði rætt um hermenninar hjá Saddami.. Tá ið " The Big Brother" hevði talað, slerdu somu tíðindatænasturnar seg til tols við tað, sum Pentagon segði.

Peter Williams vildi vera við, at myndirnar frá tí russiska fylgissvein-inum vóru ov vánaligar og ikki kundu brúkast til prógvførsluna um irakakisku soldatarnar, men Jean Heller var ikki einig í hesum pástandi.

Satt var tað, at tær russisku myndirnar vóru ikki eins góðar sum tær amerikasnku fylgissveinamyndirnar, men løgið tyktist tað, at serfrøðingarnir kundu ikki burturvísa pástandin hjá Jean Heller, at har vóru eingir irakiskir hermenn á myndini — bert ameri-

*Framhald á síðu 10*